Innlendismálaráðið

# Stuðul av játtanini

## til útoyggjamenning

Innlendismálaráðið umsitur eina játtan, hvørs endamál er at stuðla tiltøkum í útoyggjum, sum virka mennandi fyri hesar.

Játtanin verður umsitin sambært reglugerð, sum fæst á www.imr.fo ella við at venda sær til Innlendismálaráðið.

Umsóknarfreistin at søkja stuðul er 1. februar 2006.

---

Innlendismálaráðið

# Stuðul av játtanini

## til umhvørvisverndartiltøk

Innlendismálaráðið umsitur eina játtan, hvørs endamál er at stuðla tiltøkum

- sum menna vitanina um umhvørvið og/ella náttúruna
- sum virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella -avmarkandi
- sum verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg
- sum kunna almenningin um umhvørvis- og/ella náttúruviðurskifti.

Umsóknarblað, kunning og reglugerð fæst á www.imr.fo ella við at venda sær til Innlendismálaráðið.

Umsóknarfreistin er 1. februar 2006.

---

Innlendismálaráðið

# Stuðul av játtanini

## til frama fyri viðarvøkstur

Innlendismálaráðið umsitur eina játtan, hvørs endamál er at stuðla viðarvøkstri fyri at fríðka um lendi, skapa lívd og rekreativ økir, umframt verja ímóti jarðarmáan.

Umsóknarblað, kunning og reglugerð fæst á www.imr.fo ella við at venda sær til Innlendismálaráðið.

Umsóknarfreistin er 1. februar 2006.

---

TEKNMÁLSTULKATÆNASTAN
The Sign Language Interpreter Administration

*Vit ynskja viðskiftafólki okkara eini gleðilig jól og eit gott komandi ár.*

*Skrivstovan er stongd frá 23. desember. Opið verður aftur mánadagin 2. januar 2006*

*Teknmálstulkatænastan*

---

# *Tøkk*

*Kappróðrarfelagið NSÍ takkar stuðlum og kappróðrarfólki fyri brátt farna árið og ynskir øllum eini gleðilig jól og Guds signing í komandi ári.*

*Nevndin*

---

# Landsfundur

Landsfundurin hjá Føroya Fiskimannafelag verður í Norðurlandahúsinum tann 29. desember. Byrjað verður kl. 10.00 og hidið verður á út á seinnapartin.

Skráin verður tann vanliga fyri landsfundin, fyrst og fremst ársfrágreiðing, roknskapur og ásetan av limagjaldi.

Gestarøðari verður Petur Steingrund, fiskifrøðingur á Fiskirannsóknarstovuni. Fiskifrøði er eitt evni, sum er av stórum áhuga hjá fiskimonum, so vit vóna at menn fara at møta upp og nýta møguleikan at lurta og at seta spurningar á røttum stað. Hetta kann eisini gagna fiskifrøðingum í teirra arbeiði.

Teir, sum hava útreiðslur av luttøkuni, fáa tær endurgoldnar.

Føroya Fiskimannafelag

---

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

---



*Øllum okkara viðskiftafólki ynskja vit eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár.*

Vit vilja samstundis nýta høvi til at takka øllum tykkum, sum gleddu okkum til møtøkuna 28. oktober við at støkka inn á gólvið, við heilsanum, við blómum og sum við góðynskjum gjørdu fyrsta dagin í nýggju tannlæknastovuni so minnisríkan.

*Tannlæknastovan í Dalatúni 19*
*Marnar Gaard · Ísak Thomassen · Regin Eikhólm*

---

Felagið fyri bilhandlarar og verkstaðseigarar

Øllum limum verður ynskt gleðilig jól og gott nýggjár

F·B·V

---

SEV

## Kunngerð um afturlatingartíðir og vaktarhald hjá SEV um jólini og ársskiftið

Gjørt verður kunnugt, at allar skrivstovurnar hjá SEV eru stongdar yrkadagarnar millum jóla og nýggjár, og at øll linjuarbeiðir, skrivstovuarbeiðir og annað, sum tolir at bíða, verður steðgað í sama tíðarskeiði.

Vit hava vakt alt døgnið. Til ber at fáa fatur á vaktini á tlf. nr. 346800 í nevnda tíðarskeiði.

Vaktin tekur sær bert av viðurskiftum, sum ikki tola at bíða, sum t.d. streymslit.

Tórshavn, tann 22. desember 2005.

Elfelagið SEV